gult16 cyan16 magenta16 svart16



## EG MEINI TAÐ



*Óla Jákup Rólantsson,*
*útvarpsmaður á Rás2*

# Borðflaggið ov stórt til tignina?

Tað er so stutt síðani, at sómin, tignarleikin og virðileikin ikki rúmaðist í tí vakra gamla tinghúsinum. Tey tignarligu mettu, at ikki var pláss fyri tignini í gamla vakra tinghúsinum, sum mátti um- og útbyggjast. Úrslitið stendur har í dag – eitt millumting millum ein danskan embedsmandsbolig og eitt íslendskt missiónshús!

Fínpussanin av tignini kostaði miljónir.

Ímeðan vaks bíðirøðin at sleppa inn á Lágargarð.

Tað er so stutt síðani, at tingformaðurin metti, at pláss var ikki heldur fyri fullveldi-num í tí gamla og vakra tinghúsinum. Vit skuldu hava nýtt glashús, eina glæstriborg, har tignin kundi útstillast fyri altjóða samfelagnum, sum føroyingar nú skuldu gerast sjálvstøðug eind av. Tingformaðurin fekk ikki allan sín vilja, tí nakrir tingmenn skammaðust. Men nakrar miljónir vórðu brúktar afturat.

Ímeðan vaks bíðirøðin at sleppa inn á Lágargarð enn meira.

Tað er enn styttri síðani, at vit sóu, hvussu gekst við tignini, eftir at fyrsta og annað stigið av um- og útbyggingini varð samtykt. Tingmenn, sum Føroya fólk valdu til arbeiðis á Føroya Løgtingi, rýmdu í fornermilsi av arbeiðsplássinum, tí teir vóru ósamdir, hóast fólkavaldir til júst at samskifta. Men eingin trupulleiki tóktist at semjast um at brúka meira pening til at hýsa tignini.

Ímeðan vaks bíðirøðin til Lágargarð munandi.

Og nú kommunuvalið var í eygsjón, so skammaðust kommunalpolitikarnir í Havn at tosa um Lágargarð. Vildu heldur tosa um hvussu fínt tað varð vorðið í miðbýnum. Lágargarður var eitt dømi um, at ikki bar til at finna fram til eitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Eingin vildi tosa um størri og tignarligar karmar um tey gomlu. Spurningurin var eisini, hvør skuldi gjalda, land ella kommunur. Men landspolitikkar-arnir kvettu ikki í tvey. Vildu heldur tosa um tignarligar karmar um teirra tignarliga virksemi. Høvdu úr at gera at hyggja at modellum av nýggju tignarligu glæstriborg-ini.

Ímeðan var bíðirøðin til Lágargarð vorðin so umfatandi, at fólk sótu alspent um dagarnar og lurtaðu eftir andlátunum – kanska tað lukkaðist at fáa ommuna innum hesaferð?

Tignin bara vaks. So nógv at tingmenn gingu skít í arbeiðstíð. Flokkar tóku ábreiðslurnar at sær og proklameraðu yvirlýsingar um internan rúsdrekkapolitikk. Onkur flokkur heldur lunkaður, meðan annar skjeyt seg undir, at ”hesin trupulleiki altíð hevur verið kendur í føroyskum politikki”. Sum um tað, at føroyskir tingmenn áður drukku seg í hel, var nøkur umbering fyri, at menn í dag gera tað sama.

Og sjónleikurin heldur fram. Nú seinast klandrast teir sum smábørn um flagg ella ikki flagg. Ein provokerandi sambandsmaður provokerar við einum borðflaggi og formaðurin loypir beint á bláman og ger sær sjálvum fyri skommum við yvirhøvur at gera nakað burturúr tílíkum vanæriligum táputvassi. At Merkið hongur í tingsalinum kann man ikki semjast um, tí onkur annar legði málið fram. At Merkið hongur yvir vindeyganum oman móti Effersøe, sum í gomlum døgum, ber heldur ikki til, tí nýggja missiónshúsið hevur onga flaggstong!

Kanska flaggstongin kemur uppá telefonhúsið, sum skjótt verður sambygt við missiónshúsið, so betur pláss verður fyri tignini. Men tað skulu nógvar miljónir til afturat, áðrenn komið verður so langt.

Ímeðan frættist av Lágargarði, at fólk eru farin at ringja inn at vita, um nøkur av teimum gomlu liva heilt illa nú uppundir summarfrítíðina.

Spurningurin er, um borðflaggið ikki er órímiliga stórt at veittra fyri allari hesi tignini!

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Eirikur Lindenskov

# Teldupostur órógvar arbeiðsfriðin




*Slíkir teldupostar eru sambært ávísum donskum arbeiðsgevarum so mikið órógvandi, at neyðugt er at seta mørk fyri, nær og hvussu teldupostur skal nýtast*

**Strongd og dýrabar arbeiðstíð, ið fer til spillis. Hetta er avleiðingin av mongu óneyðugu teldupostunum, ið fleiri ferðir um dagin leypa fram á telduskíggjan. Í Danmark eru virki farin at áseta teldupostfríar tímar**

ARBEIÐSUMSTØÐUR
*John Johannessen*

Nógv av okkum nýta dagliga ein heilan tíma á arbeiðsplássinum til at lesa og svara teldupostum, ið einki hava við arbeiði okkara at gera.

Hetta sýnir ein amerikonsk kanning, ið felagsskapurin Gartner Group hevur gjørt. Amerikanski felagsskapurin er komin til ta niðurstøðu, at triðjihvør teldupostur einans inniheldur persónlig boð, ið einki hava við arbeiðið at gera.

### Teldupostfríir tímar

Í Danmark verður kanningin av teldupostvanum tikin í størsta álvara.

Lýsingastovan BBDO í Keypmannahavn hevur gjørt av at banna starvsfólkum sínum at senda teldupost millum klokkan tíggju fyrrapartin og klokkan trý seinnapartin.

Danska lýsingastovan sigur seg hava tikið hetta stigið, tí teldupostar kosta eina rúgvu av mistari arbeiðstíð og elva til strongd millum starvsfólkini. Tó hava einstakir ráðgevar í fyritøkuni fingið undantaksloyvi, tí teir ikki kunnu vera tøkniliga sambandinum fyri uttan í dagliga samkiftinum við viðskiftafólkini.

### Telefonin er betri

Julianne Meulengracht, ið er leiðari fyri donsku lýsingastovuna, sigur í grein í Jyllands-Posten, at telefonsamrøður eru nógv betri enn skjótt skrivaðir teldupostar.

– Vit eru vorðin samd um, at ein telduposthsteðgur skapar skapandi arbeiðsfrið og noyðir okkum at taka telefonina, sigur hon.

Leiðarin fyri eina danska ráðgevingarfyritøku er parvís samdur við grundgevingunum hjá Julianne Meulengracht og teimum á BBDO. Í hasara fyritøku eru gjørd tíggju boð um, hvussu teldupostурin skal nýtast. Millum annað er bert loyvt at senda teldupostar til fólk, ið veruliga hava brúk fyri teimum.

Stjórin fyri donsku ráðgevingarfyritøkuna sigur við Jyllands-Posten, at tað eftir hansara tykki loysir seg fíggjarliga at avmarka nýtsluna av teldupost á arbeiðsplássinum. Hetta sýnir hann eisini við einum dømi.

– Um 800 fólk brúka 30 sekund at lesa ein teldupost um, at ein bilur stendur á parkeringsplássinum við ljósunum tendraðum, kostar hetta 400 minuttir av arbeiðstíð, ið verður brúkt til einki. Tá er blíligari at ringja eftir Falck og biðja tey koma við einum startkaðali, vísir danski stjórin á.

### Teldupostur frískar upp

Øll eru kortini ikki samd við donsku stjórunum. Á heimasíðuni hjá DR ber til hjá vanligum internetbrúkarum at siga sína meining um, hvørt teldupostur kostar arbeiðstíð, og um hann elvir til strongd.

Og her eru fleiri, ið halda lítið um hugskotið við teldupostfríum tímum á arebiðsplássinum. Onkur heldur, at tað ikki kann vera verri at senda ein teldupost, enn at práta við síðumannin eina løtu.

Onkur annar vísir á, at starvsfólk við hvørt hava brúk fyri at halda ein lítlan steðg, og tá er deiliga uppfrískandi at lesa ein teldupost.

– Eg sendi privatar teldupostar frá arbeiðsplássinum, og eg haldi, at tað er OK at gera tað. Eg trúgvi ikki uppá, at tað ber til at arbeiða effektivt og rationelt langa tíð í senn. Tað hevur týdning, at tú gleðir teg til tann næsta lítla steðgin. Eg eri eitt menniskja og ikki ein maskina. Eg veit, at eg fái meirta og dygdarbetri tilfar frá hondini, tá eg eri glaður og væl nøgdur, enn tá onkur stendur og skríggjar í oyrað á mær um rationalitet og effektivisering.

– Eg gerist glaður, tá eg fái ein fittan teldupost frá onkrum, eg eri góður við. Og eg kenni meg væl, tá eg kann gleða onnur á sama hátt. Eg geri ikki ov nógv av hesum. Eg taki eisini arbeiðið heim við nakrar ferðir, skrivar onkur á heimasíðuni hjá DR.

Sostatt er spurningurin um teldupost á arbeiðsplássinum ikki eins svart hvítur, sum summir danskir arbeiðsgevarar vilja gera hann.

Í Føroyum kenna vit enn einki dømi um arbeiðspláss, ið hava sett bann fyri telduposti.

gult17 cyan17 magenta17 svart17



# Tey syngja vestan fyri fjall

## »Kórið Sólarmagn hevur sína fyrstu konsert«



*Kórið Sólarmagn varð sett saman til hátíðarhaldið, tá nýggi skúlin varð tikin í nýtslu seinasta summar. Her avmyndað av bakkanum undir skúlanum. Mynd: Óli Rubeksen*

Leygardagin 19. mai verður fyrsta konsertin í nýggja snotuliga skúlanum á Velbastað. Kórið Sólarmagn, við sangarum úr Kirkjubø og av Velbastað, fer saman við tónleikarum at framføra eina fjølbroytta skrá.

Kórið Sólarmagn varð sett saman til hátíðarhaldið, tá nýggi skúlin varð tikin í nýtslu seinasta summar. Og tað steðgar ikki, men syngur og syngur alsamt. Navnið »kórið Sólarmagn« sigur, at tey halda seg hava ávíst tilknýti til ungmannafelagið Sólarmagn, sum varð stovnað í 1895. Kórið hevur eisini sungið til guðstænastur í Kirkjubøar kirkju. Leiðari tess er Fróði Sandoy á Velbastað.

### Málsnillingar

Kórið fer at syngja sangir úr mongum londum. Søgur um kærleika, hepnan eins og óhepnan, verða sagdar á íslendskum, donskum, schwyzerdütsch (sveisiskum týskum) og norskum. Saman við einum strúkaraensemble fer kórið at syngja Bellman.

Lívsgleði verður staðfest í einum enskum madrigali, eisini við strúkarum. Hægri maktir verða lovaðar á amerikanskum og hitt klára, góða vínið verður prísað á góðum fronskum máli. Tungt arbeiði í Afrika verður lýst í einfaldum ljóði.

Og saman við Palla Hansen fer kórið at syngja sálmakendu vísuna Rättnu min tid, sum Olle Adolphson gjørdi til ein leik hjá kekkanum Oldich Dank.

Velbastaðmenn og Kirkjubøingar eru millum tey fáu her á fold, sum duga indo-evropeiska málbrigdið føroyskt. Tað kynstrið verður víst í einum tyssi av songum um alsk til náttúru og føðiland.

### Sangsókn

Sangur og kvøðing hava verið og eru týðandi ítriv vestanfyri fjallið. Góður føroyskur dansur hevur livað í bygdunum báðum gjøgnum nógv ættarlið. Kvøðararnir hava borið nógv av gamla sniðinum við sær nærum fram til okkara dagar. Og útvarpið eigur tíbetur upptøkur av til dømis sitandi kvøðing á Velbastað. Nógv hevði kanska verið mist, um ikki so var.

Nógv sálma- og vísuløg eru niðurskrivað eftir fólki heimanfyri, serliga hava feðgarnir sálu, Wenzel og Juul Andreasen verið við at varðveita stóran part av hesum mentanararvi.

Konsertin verður í Velbastaðar skúla leygardagin 19. mai kl 17 og fer at vara 1 tíma. Atgongumerki fyri kr 50 fáast við dyrnar. Børn sleppa inn ókeypis.



*Kórið Sólarmagn avmyndað framman fyri nýggja skúlan á Velbastað.*

*Mynd: Timmi Nielsen*